# Minningarorð yvir Árna Olsen, yvirlækna



Fríggjamorgunin 7. desember doyði Árni Olsen, aftan á stutta sjúkralegu, 79 ára gamal.

Árni vaks upp í Kunoy, har mamman Elspa, saman við Jóhan Svend, lærara úr Svínoy, giftast inn í bóndahúsini og festu tey Árnastovu.

Árni giftist við Elisabeth, f. Clementsen, av Granda í Húsavík og fingu tey saman synirnar Jóan Eyðfinn, Klæmint, Bjarna og Sjúrða.

Árni Olsen fór bert 12 ára gamal til Havnar í framhaldsskúla og hava vit mangan skift orð um, hvussu tað var so ungur at fara heiman av bygd í skúla í eini tíð, har ferðasambandið ikki loyvdi heimferð í skúlafrí, fyri ikki um at tala í vikuskiftum.

Síðani gekk leiðin – framvegis blaðungur – niður á Sorø Akademi at taka studentsprógv sum lopfjøl til akademiskan framhaldslestur. Hann gjørdist síðani lækni, grundað á klassiskt málfrøðiligt studentsprógv, eitt uppruna-dannilsi, sum ríkaði hann fyri lívið – og sum vit onnur hava notið gott av frá hansara hond.

Liðugur sum lækni hevði hann eitt strik, men greiddi so ymisk læknaarbeiði og praktiska framhaldsútbúgving, inntil hann eitt drúgt tíðarskeið í fimti-árunum var kommunulækni í Vágunum, har mong nú eldri enn umrøða hann við virðing.

Aftan á tað fór hann við familju síni aftur niður, hesuferð at fáa sær serútbúgving innan fyri sálarsjúkufrøði og neurologi og kundi sostatt vælútbúgvin við tvinnum serlæknagreinum skorða undir og taka við tí veldugu avbjóðing, sum tað var at veita føroyingum heima og heimvendum úr útlegd forsvarliga sálarsjúkugreining, viðgerð og røkt.

Hann byrjaði saman við øðrum góðum fólkum longu áðrenn Staturin bygdi tað tá stásiliga Statshospitalið, seinni psykiatriska deild, sum stóð liðugt og fult útbygt í 1972 við umleið 100 seingjarplássum, tá tað var upp á tað mesta. Hann megnaði at taka afturat sær dugandi og samvitskufull samvirkafólk og stýrdi við dugnaskapi, myndugleika og hepnari hond deildini alla tíðina, til hann við evsta mark mátti fara frá fyri aldur. Og tó, so var hann aftan á fráfaringaraldur biðin um at vera avloysari fyri yvirlækna, og í tí arbeiðinum ferðaðist hann út á bygd og legði nógv fyri, framvegis dugnaligur og virkisfúsur hóast aldurin, og fekk hann sum pensionistur ongan fíggjarligan fyrimun av hesum sínum arbeiði.

Sum breitt serútbúgvin og undangongumaður innan føroyska sálarsjúkufrøði, var Árni Olsen natturliga generalist og tó samstundis serkønur um ein háls.

Hann var hámettur og virdur av starvsfelagnum so væl her sum uttanlanda, og hjá okkum her á psykiatrisku deild gjørdist hann yvirfyri so væl starvsfólki, sum brúkarum, ímyndum av einum húsfaðiri, har tað leingi var vanligt, at fólk søgdu seg annaðhvørt arbeiða hjá ella »liggja hjá« Árna Olsen.

Hann sepnti fakliga og menniskjansliga sæð ótrúliga víða, las nógv og helst seg ajour við øllum tí nýggja innan psykiatri, og samstundis hevði hann format til at vera opin fyri nýggjum intrivum.

Tað gav at bíta, tá eg sjálvur beyð mær framat innan føroyska sálarsjúkufrøði. Hann lat allar hurðar upp fyri mær og var hin ósvikaligi lærumeistari, vegleiðarin og samhaldsfasti vinurin fyri lívið. Stuðlandi og altíð hollur í ráðum, men á ein kompetentan og samstundis lítillætnan hátt, sum bert fáum er beskorið. Ongantíð varð ein niðurgjørdur ella sleptur upp á fjall í mistøkum. Hann dugdi meistarliga væl, og trúgvur móti sínum klassiska dannilsi, at brúka sokratiskan samskiftis- og frálæruhátt.

Tú hugsaði og segði kanska okkurt illa umhugsað og fekst frá honum bert til aftursvar: »jú, jú, so sigur ella heldur tú«! og so vitsti ein straks, at hugsanin var verd eina umafturhugsan.

Undirritaði fekk ta lívseydnu at samvirka við Árna í yvir 20 ár. Tað var hjá okkum øllum verandi á psykiatrisku deild stórur saknur á honum, hóast fólk sjálvsagt koma í mans stað.

Fyri meg gjørdist saknurin ómissiligur, bæði fakliga, samstarvsliga og persónliga – vit fingu jú mestu mandómsár til arbeiðis saman og var ongantíð øvugt orð av týdningi okkara millum.

Í eini arbeiðsverð, har psykologar vanliga vóru illa sæddir, gjørdist tað mær ein forrættur at fáa Árna Olsen og Hera Berg, sála, sum fyristøðufólk, vegleiðarar og gubbar. Teir høvdu format til at vera opnir fyri nýggjum og øðrvísi.

Eisini privat hugsaði Árni og familja hansara um meg og okkum í familjuni eins og gomlu arbeiðsfelagum á psykiatrisku deild – eisini aftan á, at Árni var faren endaliga frá, fyri 10 árum síðani.

Tískil vil eg nú við deyða Árna Olsens, saman við míni familju – og hugsi eg øllum fyrrverandi so væl sum núverandi starvsfólkum á psykiatrisku deild – í takklæti lýsa frið yvir minnið um Árna Olsen, yvirlækna, samstundis sum vit sýna samkenslu við konu og synum við familju. Hann var eisini so góður við tey øll og tey við hann.

Føroya land hevur fostrað og fostrar enn, úrmælingar, bæði menn og kvinnur innan handans og andans verk, og millum tey og teirra telist vissuliga Árni Olsen, sáli.

Takk fyri lívið saman við tær, og hvíl nú í friði – okkara alra góði Árni Olsen.

**EyJo/tsj**









# Nýtt føroyskt íløgufelag

**Um eina góða viku setur Kaupthing Føroyar á stovn nýtt íløgufelag**

FÍGGJARMARKNAÐUR
*Jákup Mørk*



*– Lánsbrøv hava jú tann fyrimunin, at íleggjarin altíð er vísur í at fáa eina rentutilskriving, sum er støðug, sigur leiðain av nýggja íløgufelagnum hjá Kaupthing*

*Mynd: Jonhard Hammer*

Í nýggjatu útgávuni av Útlit og Rák, skrivar Kaupthing, at felagið nú fer at seta á stovn nýtt íløgufelag. Nýggja felagið fær heitið, Lánsbrøv í DKK.

## Íløgufelagið

Eitt íløgufelag er eitt felag, sum savnar kapitalinnskot frá fleiri íleggjarum, soleiðis at hesi øll fáa teir stórdriftsfyrimunir, sum annars ikki eru gjørligir uttan so, at talan er um veruliga stór innskot.

Á hendan hátt hava eisini smærri íleggjarar møguleika at koma við í eina størri eind, soleiðis at tað verður gjørligt at spjaða íløgurnar yvir fleiri sløg av virðisbrøvum, og hetta gevur so aftur tann fyrimunin, at samlaði vágin fyri íløguna gerst minni.

## Minni vága

Tað er 32 ára gamli Hans Peter Clementsen, sum annars hevur verið hjá Kaupthing síðani stovnanina, ið er settur sum ognarrøkil hjá nýggja felagnum. Í starvsheitinum liggur sjálvandi tað, at hann skal viðlíkahalda og helst betra um tær ognir, sum eru í felagnum, tó at hesar ikki eru av nøkrum fysiskum slag.

Um avgerðina at stovna nýggju deildina sigur Hans Peter, at hann sær hetta sum ein náttúrlig menning av virkseminum hjá Kaupthing.

– Áðrenn Kaupthing kom á marknaðin, hevði vanligi føroyingurin sum so bert ein uppsparingarmøguleika. Hann kundi seta peningin á bók í peningastovnunum.

– Síðani er so ein nýggjur møguleiki komin við altjóða partabrøvunum, sum Kaupthing hevur fingist við, men ímillum hesar møguleikar eru so eisini lánsbrøv, og nú lata vit so eisini upp fyri hesum.

Um fyrimunirnar við at gera íløgur í lánsbrøv heldur enn partabrøv sigur Hans Peter, at størsti munurin er í váganum fyri íløguni.

– Lánsbrøv hava jú tann fyrimunin, at íleggjarin altíð er vísur í at fáa eina rentutilskriving, sum er støðug, og hóast kursurin kann sveiggja nakað, so veitir staturin trygd fyri, at tá lánsbrøvini eina ferð verða innfríað, hendir hetta til kurs 100.

– At íløgan á hendan hátt er tryggari, merkir so eisini hinvegin, at møguleikarnir fyri munandi vinningi eru nakað minni, enn teir eru við partabrøvum. Rentan á lánsbrøvum er jú fastløgd frammanundan, meðan avkastið á partabrøv eru tengd at, hvussu tað gongst einstøku fyritøkunum.

Tað er eingin loyna, at fallið á partabrævamarknaðinum hevur veirð stórt seinastu tíðina, tó at uppsvingið hevur verið sera stórt seinasta góða mánaðin.

Vit spurdu eisini Hans Peter, um hetta ikki var við til at gera lánsbrøvini meira áhugaverd.

– Tað er rætt, at partabrævamarknaðurin ikki var so góður í fjør. Amerikanski búskapurin hevði tað ikki so gott, og tí minkaðu vísitølini nógv kring heimin.

– Avleiðingin av hesum hevur so verið, at miðbankarnir báðu megin Atlantshavið hava lækkað rentuna sera nógv, og tá so er, so gerast lánsbrøvini eyka áhugaverd, tí rentan har er føst. Hyggur tú til dømis eftir peningastovnunum, so ber í dag illa til at fáa meira enn 3,6% í rentu, meðan lánsbrøv kanska geva upp ímóti 8%. Her er jú greiður munur á, hvønn vinning íleggjarin hevur.

## Føroyingar venja seg

Hóast hetta við íløgufeløgunum er rættiliga nýtt í Føroyum, so tykist Hans Peter kortini at láta væl at gongdini.

– Eg haldi, at føroyingar nú eru um at venja seg við hetta slagið av íløgum. At hetta er ein nýggjur háttur at spara saman uppá, og hóast sveiggini á eitt nú partabrævamarknaðinum hava verið stór, so duga fólk eisini at síggja hetta sum eina langsiktaða íløgu.

– Tað hevur fyrst og fremst verið hetta, sum hevur skumpað undir skrásetingina av nýggja felagnum, tí vit meta sum sagt, at tørvur er eisini á hesum íløgumøguleikanum.

Nýggja íløgufelagið byrjar formliga virki sítt hin 17. desember, og fram til fríggjadagin komandi kunnu íleggjarar nýtekna pening í felagnum uttan fyrisitingarkostnað av nøkrum slag. Tekningin av hesum kann fara fram bæði hjá Kaupthing Føroyar og hjá Føroya Sparikassa.

**Starvsfólk til Bókhaldið**

"Ein fyrimunur við at vera órvddiligur, er, at eg í heilum geri nýggjar og spennandi uppdagingar"

Pelle Pumm



Til okkara bókhald verður søkt eftir einum fólki at byrja skjótast gjørligt.

Í Bókhaldinum eru 9 starvsfólk. Høvuðsuppgávurnar í deildini er umsiting av kreditorum, lønum, kassum og fíggjarbókhald. Øll bókføringin er á Oracle Financials.

Tann, sum settur/sett verður, má rokna við at luttaka í øllum uppgávum á deildini.

**Tín førleiki:**
Tú skal hava skrivstovuútbúgving ella líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á, at tú kann taka ábyrgd og arbeiða sjálvstøðugt.

**Tað er eisini ein fyrimunur at hava**
· førleika við EDV
· skúla t.d. merkonom, HH ella aðra viðkomandi útbúgving
· góðan røkjuskap
· góð samstarvsevni

Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum góðum, avbjóðandi og mennandi umhvørvi.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Arbeiðsgevarafelag og Starvsmannafelagið.

Gjøllari upplýsingar viðvíkjandi starvinum kunnu fáast við at ringja til Martin á Mýruni, deildarleiðara, tlf 30 30 30 lokal 3205 ella Heina Joensen, fíggjarstjóra, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum viðmælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mikudagin 02. januar 2002.

Umsóknir skulu sendast til

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!